tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Skiftið á brúnni

## *Oddagrein*

Tjóðveldisflokkurin er farin at gera flokkin meiri nútímans og formaðurin í flokkinum verður nú eisini politiski leiðarin. Broytingin fer óivað at bera í sær, at flokkurin helst verður greiðari í politiska arbeiðnum og samfelagsliga orðaskiftinum.

Tað hevur ofta verið torført at fingið greiði á, hvørja áskoðan Tjóðveldisflokkurin hevur havt í ávísum málum. Formaðurin í tingbólkinum - sum má sigast at hava verið politiski leiðari floksins - hevur sagt eitt, men flokkurin, ella tingmanningin, hevur sagt eitt annað, tá tað er komið til stykkis. Fleiri dømi hava verið í seinastuni, og tey hava sett spurnartekin við trúvirði floksins.

Tað kom ikki óvæntað, at eyka flokstingið valdi Høgna Hoydal til formann í flokkinum sambært nýggja bygnaðinum. Tjóðveldisfólk kunnu takka honum og øðrum yngri kreftum fyri, at flokkurin reisti seg aftur, eftir at vera endaður heilt niðri á 10 prosentum av atkvøðunum miðskeiðis í 90-unum. Tær yngru kreftirnar góvu flokkinum eitt nýtt andlit, og gjørdu helst sítt til, at nógv fólk tóku seg saman fyri at royna at geva flokkinum ein møguleika, ein "tjans" afturat. Flokkurin var nærum stirnaður við teimum heldur litleysu gubbunum, sum myndaðu flokkin hetta tíðarskeið.

Hugtakið "skipað loysing" gav loysingarhugtakinum meiri innihald, og minni víðgongd sjálvstýrisfólk kundu atkvøða fyri lista E. Fullveldisætlanin gjørdist veruleiki og tilgongdin er á einum avgerandi móti. Hinvegin hava nýggju kreftirnar førkað Tjóðveldisflokkin frá einum sosialt tilvitandi verkamannaflokki til ein meiri populistiskan flokk, sum onkuntíð liggur høgrumegin Fólkaflokkin í politiskum meiningum.

Nú hava tær ungu og heldur óroyndu kreftirnar fingið alt valdið í flokkinum, og eingin úr veinginum hjá Finboga Ísaksyni, Signari á Brúnni ella Hergeiri Nielsen eru umboðað í floksstjórnini. Spurnartekin kann setast við, um tær yngru kreftirnar duga javnvágina og hava ta neyðugu barlastina, tá tað fer at standa á í torførum samráðingum um framtíðarstøðu Føroya! Er eitt leiðslubýti ikki gjørt í fullum samljóði, kann eitt innanhýsisstríð verðalemjandi.

Unga stjørnan hjá Tjóðveldisflokkinum hevur dugað væl at ført seg og flokkin fram, men higartil hevur nývaldi formaðurin tosað í yvirorðnaðum vendingum, í yvirskriftum, og sagt minni um sjálvan tekstin. Tað er lætt at "miðja ímóti", "hava greiðar linjur" og "tryggja" hesum og hasum. Veri er at fremja ein politikk í verki og finna tær neyðugu semjurnar millum persónar og flokkar.

Hóast nýggi bygnaðurin ikki tykist heilt greiður við floksstjórn og aðalstjórn, og ásetingum, sum helst skulu tryggja onkrum eitt pláss í floksleiðsluni, so leggur hann politisku ábyrgdina og somleiðis politiska valdið á eitt stað. So er bara spurningurin, um tað neyðuga mótspælið í floksleiðsluni verður nóg munagott.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Familieskab forpligter



Det er forstemmende at følge udviklingen i de dansk-færøske relationer, især hvis man som jeg nærer en dyb kærlighed til de små grønne øer og deres mennesker deroppe i det barske Nordatlanten. Det er en kærlighed "på trods" af en masse ting: Klimaet, færingernes ubestridelige stridbarhed, deres økonomiske uansvarlighed osv. osv. Men for mig er der noget betagende ved et lille folk, der har overlevet i århundreder "på trods" af den ugæstmilde natur, og som oven i købet har formået at udvikle en sjældent rig kultur. Og så er vi frænder. Vi er familie, har et Rigsfællesskab. Det er nu hårdt presset af vrede og uforsonlige udfald fra begge sider. Hvordan er det dog kommet så vidt?

Der er fejl på begge sider. De fleste danskere er med god grund irriterede over mange års samfundsøkonomisk uansvarlighed på Færøerne, med vildt overforbrug og uforklarlige trafikinvesteringer. På den anden side har færingerne ikke glemt, at de blev snydt godt og grundigt af danske ministre i sagen om Færøbanken. Ganske vist fik de ikke den økonomiske øretæve det tegnede til, men forurettelsen og forbitrelsen sidder tilbage. Og den har næret ønsket om øget færøsk selvstændighed.

Men her skal vi huske, at færingerne er delt midt over i dette spørgsmål. Og det er de færreste færinger, der ønsker fuldstændig løsrivelse fra Rigsfællesskabet med Danmark. Det er kun naturligt, at færingerne gerne vil overtage mere af ansvaret for deres egne anliggender. Så skal de også have at vide, at med ansvar følger forpligtelser, blandt andet for egen økonomi. Der vil utvivlsomt kunne frigøres mange slumrende kræfter i det færøske samfund, hvis man skal stå mere på egne ben. Det så vi i Island, hvor man efter selvstændigheden skulle gennem en overordentlig vanskelig tid, men hvor det meget fattige efterkrigs-Island på beundringsværdig vis fandt sine egne kvaliteter frem, og blev et rigt samfund.

Derfor er det så trist, at sagen er sat på spidsen i forholdet mellem Færøerne og Danmark. Det var der ingen grund til. Den danske statsminister har optrådt meget kontant overfor færingerne. Og politikere og lederskribenter i Danmark har stået i kø for at rose ham for klar tale uden uld i mælet. Den kø stiller jeg ikke op i. Det giver en særlig forpligtelse af være den store i et Rigsfællesskab. Og det må ikke reduceres til et spørgsmål om indenrigspolitiske markeringer - hverken i Danmark eller på Færøerne.

**Uffe Ellemann-Jensen**

# Nýggjan floksbygnað

Á eykaflokstingi um vikuskiftið hevur Tjóðveldisflokkurin samtykt at samskipa bygnaðin í flokkinum soleiðis, at vald verður ein floksstjórn.

Bygnaðurin í tjóðveldisflokkinum hevur higartil verið tvíbýttur: Valdømisfeløg, aðalstjórn og starvsnevnd hava skipað seg øðrumegin. Meðan ting- og landsstýrismanning hevur verið skipað hinumegin.

Hesin bygnaður heldur fram, men ein floksstjórn verður nú vald við fimm limum, ið skal samskipa arbeiði floksins millum teir valdu politikararnar og floksskipanina annars.

Flokstingið velur formann, tveir næstformenn og kassameistara í floksstjórnina. Formaðurin og ein næstformaður skulu vera løgtingsvaldir politikarar, meðan hin næstformaðurin og kassameistarin skulu ikki hava sæti á tingi. Tingbólkurin velur sjálvur millum tey tingvaldu tann fimta limin í floksstjórnina.

Harafturat verða valdir tveir tiltakslimir, harav annar skal vera løgtingsvaldur.

Á flokstinginum leygardagin 8. apríl vóru hesi einmælt vald í floksstjórnina:

**Høgni Hoydal** er formaður í floksstjórnini

**Heini O. Heinesen**, sum er formaður í tingbólki tjóðveldisfloksins, er næstformaður í floksstjórnini

**Óli Holm**, er somuleiðis næstformaður í floksstjórnini og heldur fram sum formaður í aðalstjórnini

**Hildur Patursson** er floksstjórnarlimur

**Atli Eiriksson** er kassameistari

Tiltakslimir eru Finnur Helmsdal og Annlis Bjarkhamar

### Álitið á fólkaræðisligu skipanina

Tann samskipaði bygnaðurin í flokkinum skal tryggja, at Tjóðveldisflokkurin kann ganga á odda í teimum stóru avbjóðingum, ið standa føroyingum fyri framman:

– Eitt miðvíst arbeiði skal gerast til tess at savna allar kreftir og virka fyri, at ein stórur meiriluti fer at atkvøða fyri at taka fulla ábyrgd av landinum á fólkaatkvøðuni

– Tjóðveldisflokkurin fer at leggja dent á at vísa á teir stóru møguleikar og fyrimunir, sum fullveldi fer at geva føroyingum

– Tjóðveldisflokkurin fer at í næstum at leggja fram síni stevnumið fyri politikkin í einum sjálvstøðugum og sjálvbjargnum Føroyum

– Tjóðveldisflokkurin fer at leggja fram ein greiðan vinnulívspolitikk, arbeiðsmarknaðarpolitikk, almanna- og heilsupolitikk, útbúgvingar og mentanarpolitikk, rættarpolitikk og umhvørvispolitikk

Tjóðveldisflokkurin fer komandi tíðina at leggja serligan dent á at skapa álit millum føroyingar á okkara fólkaræðisligu skipan og at fáa skapt álit og loyst tær mongu ósemjurnar á arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðast skal fyri felags málum um betringar á egnum og tryggum grundarlagi, heldur enn at stríðast um teir trupulleikar og tær brostnu vónir, sum vit hava skapt undir heimastýrinum.

**Tórshavn, 10. apríl 2000**
**Tjóðveldisflokkurin**

**Lesið tíðindi**
**www.sosialurin.fo**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma og omma

**AMANDA THOMSEN**
Tvøroyri

so brádliga varð tikin frá okkum.

Tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, sum so væl var um hana til tað seinasta og til tykkum, sum á ymsan hátt vístu hjálpsemi.

Tøkk til prest í kapellinum og kirkjuni, kirkjutænarar, sangarar, berarar og annars øll, sum hjálptu til við jarðarferðini.

Takk fyri peningagávur, kransar og blómur og til tykkum øll, sum ringdu. Eisini ein tøkk til tykkum, sum hjálptu til í Missiónshúsinum. Til seinast takka vit øllum, sum fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðið.

*Heilsan*

**Karl Arne, Sennøva**
**og ommusynirnir á Tvøroyri**





# Til reiðar at vinna!

Vit á Kaupthing hava tikið støðu og eru klár at taka dystin upp. So nú kanst tú gjøgnum okkum senda tínar pengar út at vinna fyri teg. Og sum tú veitst, pengar sum arbeiða, vaksa ofta skjótari enn pengar, sum liggja stillir. Tú kanst lata pengarnar arbeiða fyri teg upp á ymsar mátar. Tú kanst lata okkum umsita tína ogn serstakt við okkara ognarrøkt, ella tú kanst keypa partar í einum av okkara íløgufeløgum.

**Ognarrøkt**
Við eini avtalu um ognarrøkt letur tú okkara serfrøðingar á altjóða fíggjarmarknaðinum arbeiða fyri at fáa so stóran vinning av tínum ognum, sum gjørligt. Áðrenn vit byrja, avgera vit í felag, hvussu íløgurnar skulu gerast, soleiðis at íløgurnar hóska til tín tørv. Hevur tú gjørt eina avtalu við okkum um ognarrøkt, fært tú við føstum millumbili eina frágreiðing um, hvussu gongst tínum ognum. Hevur tú internetsamband og hevur fingið brúkaranavn og loyniorð, kanst tú á okkara heimasíðu dagliga fylgja við, hvussu gongst tínum ognum.

**Íløgufeløg**
Eitt íløgufelag er eitt felag við limum, sum við størri og smærri upphæddum eru gingnir saman um at gera íløgur í partabrøv og lánsbrøv á altjóða fíggjarmarknaðinum. Hetta merkir, at tann lítli innskjótarin í íløgufelagnum fær somu stórrakstrarfyrimunir, sum stórir íleggjarar. Í Kaupthing hava vit fleiri sløg av íløgufeløgum, sum okkara fólk við serkunnleika umsita. Sostætt ber altíð til at finna eitt íløgufelag í Kaupthing, sum hóskar júst til títt lindi. Vinningurin av íløgum í íløgufeløgunum var í 1999 millum 8% og 36%.

**Um Kaupthing**
Kaupthing var stovnað í 1982 og tók leiðsluna í globaliseringini av tí íslendska fíggjarheiminum við handli av útlendskum partabrøvum, stovnseting av útlendskum íløgufeløgum, og stovnseting av deild í Luksemburg. Nú hevur Kaupthing so latið upp deild í Føroyum og eisini í New York. Tað arbeiða yvir 200 fólk hjá Kaupthing, harav nú 3 í Føroyum. Hesi vælútbúnu fólk hava tilogna sær eina servitan innan so gott sum øll øki í fíggjarheiminum. Kaupthing umsitur yvir 20 milliardir DKK fyri síni viðskiftafólk ígjøgnum ognarrøkt og íløgufeløgini.

Kundi tú hugsað tær at latið okkum røkt tínar ognir ella at gera íløgu í eitt íløgufelag, ella tú vilt vita meira, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

KAUPTHING
ÍLØGUBANKI

Kaupthing Føroyar, Box 3090, 110 Tórshavn,
Tel 351500, www.kaupthing.com